# UMSJÓNARFÓLK

Hervið verður søkt eftir húsavørði til Vestmanna Skúla og Ítróttar-høll at arbeiða við dagligari røkt av bygningum og umhvørvi.

**Arbeiðsuppgávur**
Saman við starvsfeløgunum at hava um hendi dagligu røktina av Vestmanna Skúla og Ítróttar-høll.

Umhvørvið uttan um bygningarnar er ein sjálvsagdur partur av arbeiðinum.

Vaktarskipan, sum leiðandi húsavørðurin hevur ábyrgdina av, er partur av dagligu arbeiðsgongdini.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir fyrikomandi fólki, sum dugir at arbeiða sjálv-støðugt og verða partur av einum toymi við trimum fólkum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og hevur tilvísing til leiðandi húsavørðin.

Lønar- og setanaðarviðurskifti eru við avvarandi yrkisfelag.

Starvið verður sett frá 1. september 2007 at rokna ella skjótast gjørligt aftaná.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Helgi Finn Poulsen, leiðandi umsjónarmann, á tlf. 230107.

Umsókn saman við møguligum prógvi og viðmælum skal sendast til Vestmanna Kommunu, Bakkavegur 16, 350 Vestmanna.

Umsóknin skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 13. august 2007, kl. 12.00.

Vestmanna Kommuna skilar sær rætt til frítt av velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.

**VESTMANNA KOMMUNA**

## Dagrøktari til Leirvíkar kommunu

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir dagrøktara, at byrja tann 20.august 2007.

Vit ynskja, at tú
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri.
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum.
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni.
- Ert tolin og vísir umsorgan.
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar.

Í dagrøktarskipanini starvast 11 dagrøktara, ein námsfrøðingur í spælistovuni og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 47.

Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktararnir ísenn við børnunum í fimleikarhøllini.

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 - 17.15. Lønin er sambært sáttmála við FA.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443251 ella á 743251 og tosa við Marion Leifsdóttir, dagrøktarleiðara.

Leirvíkar Kommuna tilskilir sær rættin til at lýsa starvið av nýggjum um ov fáir umsøkjara eru.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19.juli 2007.

Vinarliga send umsókn tygara til.

**Leirvíkar Kommunu**
**Dagrøktarskipanin**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

## Sands Skúli

# Lærarar

Lýst verður eftir 2 lærarum til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 vegna avlopstímar og niðursetta tíð.

Tað eina starvið er fulla tíð, og hitt er uml. 12 tímar um vikuna.

Endaliga tímatalið verður sett í september.

**Søkt verður eftir lærarum sum m.a.:**
- Undir ábyrgd leiðslunar og í samstarvi við lærarar skúlans taka lut í dagliga virksemi skúlans
- Eru fús at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum.
- Eru við til áhaldandi at menna skúlan.
- Duga at samstarva.
- Kunnu átaka sær: ábyrgd av bókasavni, ítrótt/svimjing, danskt, enskt, heimstaðarlæru og telduundirvísing. Allar lærugreinar eru hjá 1. – 5. flokki.

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða, skulu helst hava læraraútbúgving.

Starvið verður lønt eftir avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18,1 – 27,4.

**Umsóknir:**
Umsóknir við viðmælum, avrit av prógvum o.ø. skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 26. juli. kl. 12.00.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Kristian Højsted á telefon 361623 ella 252854.

**Sands Skúli**
**210 Sandur**

## KOYRIKORT?
### EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 18. juli 2007 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 503002 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**

## Bryggjudansurin

Nú verður hann aftur - -
tann kendi og sera vælumtókti bryggjudansurin hjá Tórshavnar Bátafelag,-
í Vágsbotni 21. juli, kl. 21 - 04.
LM-band spælir okkum sveimandi runt á bryggjuni –
og sjálvandi verða teir sera vælsmakkandi bátabúffarnir aftur á skránni.
Vælkomin í Bryggjudans!

**Tórshavnar Bátafelag**

## Svínoyar Kommuna

Borgarafundur verður í lærarahúsinum 20. juli kl. 20.00. Til viðgerðar sáttmáli millum Svínoyar og Klaksvíkar kommunu um samanlegging.

## Søkt verður eftir fólki til húsabygging í Havn

Talan er um fast starv við góðari løn til rætta viðkomandi.

**Ringið á tel. 210800**

**P/f Oyspan**
**á Heygnum Mikla 15**
**100 Tórshavn**